| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mai 2019 | Blað nr.: 421<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. mai 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 103/19 – 109/19**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Jógvan Arge

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Sigurð Ó. Vang
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 103/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 424 |
| 104/19 | 19/02019-1 | Søla av matr. nr. 139i, Hoyvík. Á Skarðshjalla. | 426 |
| 105/19 | 17/01728-1 | MICE | 428 |
| 106/19 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 432 |
| 107/19 | 18/04440-12 | Fyribilshølini hjá Velbastaðar skúla, leingjan av leigumáli | 441 |
| 108/19 | 19/02083-1 | Leigumál um goymslu til Tórshavnar býarsavn | 443 |
| 109/19 | 19/01090-1 | Reingerð til fólkapensjonistar í Tórshavnar kommunu | 446 |
| 110/19 | 19/00974-9 | Loyvi at leggja alminiumtak á randarhúsini á Niðaragøtu, Hoyvík | 450 |
| 111/19 | 18/04229-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1 | 452 |
| 112/19 | 17/01822-1 | Útstykking Stórabrekka | 457 |
| 113/19 | 18/00950-1 | Íbúðarbygging á Frúutrøð | 462 |
| 114/19 | 16/00394-3 | Umsókn um yvirtøku av privatum vegi ovara part av Perskonugøtu. | 468 |
| 115/19 | 16/04358-4 | Fyrispurningur um loyvi at fáa brúksrætt, leiga ella keypa øki framman fyri matr. nr. 1424 til parkering | 470 |
| 116/19 | 19/01598-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki í Havnardali, frá 4. Grundumráði til D2 øki | 472 |
| 117/19 | 19/01475-2 | West Trading : Umsókn um keyp av øki, at leggja afturat matr. nr. 43g við Argjaboðagøtu, Argir ísv íbúðabygging. | 475 |
| 118/19 | 19/01667-3 | Brúgv oman fyri Sandagerði | 477 |
| 119/19 | 19/01708-1 | Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn | 479 |
| 120/19 | 19/01619-1 | Fjarhiti til Býlingshúsið vesturi á Flat, matr. nr. 1xæ, Hoyvík | 481 |
| 121/19 | 19/01620-1 | Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn | 483 |
| 122/19 | 19/01621-1 | Fjarhiti til Badmintonhøllina, matr. nr. 1268a, Tórshavn | 485 |
| 123/19 | 19/01622-1 | Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað | 487 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 124/19 | 19/01483-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1378, Tórshavn til ummælis | 489 |
| 125/19 | 14/04756-36 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642) | 491 |
| 126/19 | 19/01676-1 | Skipan av fyribils dagstovni í Hoydølum | 501 |
| 127/19 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 503 |
| 128/19 | 19/01527-1 | Framflytingar fyri árið 2018 | 510 |
| 129/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 513 |

## ***103/19 Mál beind í nevndir 2019***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 80/19 | 19/00098-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 103/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 104/19 Søla av matr. nr. 139i, Hoyvík. Á Skarðshjalla.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 148/19 | 19/02019-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 16.05.2019 | 35/19 | 19/02019-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 153/19 | 19/02019-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 104/19 | 19/02019-1 |

**Upprunin til málið:**
20. Juni 2017, samtykti býráðið at leiga grundstykkið matr.nr. 139i, Hoyvík, út sum parkeringsbásar til tung akfør. Sí býráðssamtykt 17/01677-5.
Tað hevur síðani víst seg at áhugin fyri at leiga básar á grundstykkinum er lítil fyri at siga eingin, og hevur enn onki leigumál verið.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Grundstykki matr.nr. 139i, Hoyvík. Vídd 2.479 fermetrar, harav uml. 1.650 fermetrar eru slættaðir og asfalteraðir. Stuðlamúrur er til grannagrundstykkið.

Býráðið hevur samtykt at leiga grundstykkið út sum básar til tung akfør, men liggur grundstykkið framvegis uttan brúk.

Av og á hava fyrispurningar verið frá áhugaðum keyparum sum hava ynskt at kunna keypt stykkið, men hevur kommunan tá víst til at býráðið hevur samtykt at leiga grundstykkið út sum parkeringsbásar, og at kommunan hevur grundstykkir á sølulista í vinnuútstykking longur inni á Skarðshjalla.

Í løtuni hevur kommunan onki vinnustykkið tøkt til sølu.

Ítøkiligir fyrispurningar eru í løtuni frá áhugaðum keyparum sum vilja keypa stykkið.

Allar kommunalar fastognir skulu sum meginregla bjóðast út alment, áðrenn tær verða seldar. Eitt av endamálunum er at tryggja, at almenningurin fær kunnleika til kommunalar ognir, ið eru til sølu og at øll hava møguleika til at bjóða. Ognir skulu seljast til marknaðarprís.

Sambært kunngerð um alment útboð, kann verða vikið frá kravinum um alment útboð i sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

Grundstykkini longur inni á Skarðshjalla eru seld fyri kostprís kr. 1.300 kr./m2.

Grundstykkið matr.nr. 139i, er asfalterað og er stuðlamúrur gjørdur til granna.

Vísandi til at stykkið ikki er í nýtslu, og at kommunan onki vinnustykkið hevur á sølulista longur verður mett, at kommunan eigur at lýsa stykkið til sølu í fríðari sølu til ásettan minstaprís kr. 3.223.000,00 ( Vídd 2.479 m2 x kr. 1.300 )

Kommunan heitir á ognarmeklara um at avgreiða søluna til hægstbjóðandi.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð um alment útboð av fastari ogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja stykkið í fríðari sølu til ásettan minstaprís kr. 3.223.000,00

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

Tróndur Sigurðsson og Helen Dam á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 16. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 105/19 MICE

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 29.05.2017 | 39/17 | 17/01728-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 140/17 | 17/01728-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 184/17 | 17/01728-1 |
| 4 Vinnunevndin | 14.05.2019 | 27/19 | 17/01728-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 150/19 | 17/01728-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 105/19 | 17/01728-1 |

**Málslýsing:**
Ferðavinnan er í vøkstri, og ferðafólkini gerast alsamt sjónligari í býarmyndini. Fyri at vinnan skal gerast kappingarfør í framtíðini, og fyri at tryggja, at ferðafólkini fáa so góða uppliving sum til ber, mugu íløgur gerast í vinnuna.

Fyrsta stigið hevur verið at orða ein ferðavinnupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum skal skapa eitt grundarlag fyri menning innanlands, við eini ætlan um at menna eina burðardygga ferðavinnu, sum tekur atlit at borgarum og umhvørvi. Ein liður í hesum politikki snýr seg um MICE, sum er ein nógv eftirspurdur málbólkur innan burðardygga ferðavinnu.

**Hvat merkir MICE?**

**M** stendur fyri: Meetings ella fundir
**I** stendur fyri: Incentives ella virkisferðir, sum fyritøkur lata starvsfólkum ella samstarvfeløgum
**C** stendur fyri: Conferences ella ráðstevnur
**E** stendur fyri: Events ella størri tiltøk, td. í ítrótti, tónleiki ella øðrum

Visit Faroe Islands (VFI) metir, at Føroyar serliga eru egnaðar til virkisferðir o.l. (I) og fundir (M), og tað er eisini her, VFI hevur lagt sína orku. Talan er oftast um smáar bólkar á 20-80 fólk. Sambært VFI eru hesir bólkar góðir at fáa til Føroya, tí teir krevja bara eina sera góða tænastu og høga góðsku á teimum ymsu veitingum – og hava peningin at rinda við.

Í 2016 bleiv eitt lið við umboðsfólkum stovnað, sum skal fáa fleiri ráðstevnur (C) til landið. Hesin parturin av MICE krevur meira av ferðamálinum, men er eisini tann bólkurin, sum kann gera Føroyar til eitt vitanarsamfelag og stuðla uppundir verandi vitanartilfeingi. Væntast kann, at MICE tiltøk gerast altsamt sjónligari í býarmyndini í Tórshavn.

Umframt at MICE er ein fíggjarligt áhugaverdur málbólkur, eru nógvir aðrir ágóðar at fáa, tá ið arbeitt veðrur við MICE. MICE tiltøk eru ofta uttan fyri háárstíð, og hetta skapar bæði fleiri starvspláss, nýskapan og lív í býnum, tá ið annars lítið hendir.

MICE-vinnan er í vøkstri úti í heimi, og kappingin um henda málbólk er hørð. Í Tórshavnar kommunu eru fortreytirnar fyri at menna hesa vinnu góðar. Tað ektaða, tað trygga og náttúran er ovarlaga í huganum, tá ið ferðamálið verður valt. Eisini eru vit til reiðar, tá ið tað snýr seg um infrakervið, atkomu, og matstovu-og gistingarvinnan hevur veruliga flutt seg seinastu árini.

Kommunan vil styðja upp undir vinnuna við at skipa fyri móttøkum, tá ið altjóða MICE-tiltøk við almannagagnligum endamáli eru í býnum. Ein reglugerð er orðað og hjáløgd, ið ger mannagongdirnar greiðar fyri umsøknir frá MICE-fyriskiparum.

Stjórnarskrivstovan umsitur Mice.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum umvegis vinnunevnd og fíggjarnevnd at taka undir við hjáløgdu reglugerð.

**Vinnunevndin 29. mai 2017:**
Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Jákup Dam og Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini við teirri broyting, at kommunan styðjar MICE-tiltøkum, ið liggja uttanfyri háárstíðina 15.mai – 15. august og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tað eru tvey ár síðani, at reglugerðin fyri MICE varð samtykt. Nógv er hent á økinum:

- Býráðið hevur samtykt ein ferðavinnupolitikk.
- Býráðið hevur samtykt eina trý ára samstarvsavtalu um vinnuferðavinnu við Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands.
- Stórur vøkstur er í ferðavinnuni – eisini vinnuferðavinnuni.

Visit Faroe Island, Visit Tórshavn og Tórshavnar kommuna hava avtalað at gera eina strategi fyri vinnuferðavinnu. Ein partur av strategiini er at fáa eina dagførda reglugerð, millum annað víðkað við stuðulsmøguleikum.

Í samstarvsavtaluni við Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands eru settar kr. 500.000 av til móttøkur og kr. 300.000 av til stuðul um árið. Í 2018 vóru knappar kr. 250.000 nýttar til móttøkur. Í 2019 verður meira peningur nýttur.

Munandi broytingar í reglugerðini:

1. Í samstarvsavtaluni er tað føroyska orðið "vinnuferðavinnu" nýtt í staðin fyri "MICE", og tí verður skotið upp at nýta tað í reglugerðini. Tí verður eisini mælt til, at teldupostadressan verður broytt til VFV@torshavn.fo í staðin fyri MICE@torshavn.fo.

2. Krøvini til tiltakið eru broytt til fylgjandi:
   a) Í verandi reglugerð er luttakaratalið sett til 30, men mælt verður til at seta tað upp í 50. Til flestu tiltøkini, sum kommunan hevur játtað móttøku til, er luttakaratalið nógv hægri enn 30. Í 2018 var lægsta luttakaratalið 120.
   b) Krav er um, at fyriskiparanir eru sinnaðir at skipa fyri almennum uppleggi/tiltaki, møguliga í samstarvi við Visit Tórshavn, Visit Faroe Islands og/ella Tórshavnar kommunu. Bara í nøkrum heilt serligum førum hevur tað verið gjørt nakað

burturúr, tá ein ráðstevna hevur verið. Tað er eitt stórt arbeiði, sum verður gjørt av nøkrum fáum eldhugaðum fólkum. Tað kann tí vera tungt eisini at skipa fyri almennum tiltaki ella líknandi. Tað er eitt ynski, at meira fokus kemur á at vitanarspjaða.

c) Um søkt verður um annan stuðul, skal fíggjarætlan fylgja við, har upplýst eisini er um, hvussu tiltakið annars verður fíggjað. Hetta fyri at tryggja, at tiltakið er realistiskt, og at stuðul frá kommununi ikki verður nýttur til onnur endamál ella verður eitt yvirskot.

d) Eitt krav er nú um at fylla út eitt eftirmetingarskjal. Um vit skulu standa fremst í kappingini um at fáa vinnuferðavinnutiltøk til kommununa og Føroyar, so mugu vit vita, hvat er gingið væl, og hvat kann gerast betur. Eisini er ætlanin at nýta eftirmetingar til marknaðarføringarendamál.

e) Uppskotið inniheldur møguleika fyri at gera undantak í mun til, nær tiltakið verður hildið, og í mun til tal á luttakarum. Tað kunnu vera vinnuferðavinnutiltøk, sum eru so áhugaverd, at Tórshavnar kommuna ynskir at stuðla, sjálvt um tey fara fram í tíðarskeiðinum miðjan mai til miðjan august, ella hava færri enn 50 luttaka.

3. Reglur um annan stuðul. Galdandi reglugerð inniheldur ikki reglur um stuðul.
Skotið verður upp, at stuðul kann søkjast til eitt alment tiltak í sambandi við vinnuferðavinnutiltak, ella at nakað annað verður gjørt burturúr, sum ger eitt tiltak serlig áhugavert fyri býin, vitanarspjaðing ella ferðavinnuna ella onnur almannagagnlig endamál. Dømir kunnu verða at gera eitt heilsutiltak fyri borgarar í sambandi við eina ráðstevnu fyri heilsustarvsfólk, ella eitt serligt tiltak fyri ávísar bólkar, til dømis lesandi, yrkisbólkar v.m. Ætlanin við reglunum er at fáa meira burturúr vinnuferðavinnutiltøkunum, til dømis vitan. Harumframt liggur tað eisini eitt ynski um at fáa borgarar drignar við í vinnuferðavinnuna fyri at vísa á, at ferðavinna ikki bara kann savna inntøkur til kommununa, men eisini vitan.

   Mælt verður til, at loyva at undantak kann gerast í mun til endamálið við stuðlinum, um søkt ikki er eisini um stuðul til móttøkur. Skotið verður upp, at stuðulin verður í mesta lagi kr. 100 pr. luttakara. Tað er fyri at fáa stuðulin at røkka so langt sum møguligt.

4. Býráðsskrivstovan tekur støðu til umsóknir um at stuðla við móttøku og/ella øðrum stuðli. Hetta verður samskipað við tey starvsfólk, sum arbeiða við vinnuferðavinnu í Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn.

   Vinnunevndin verður regluliga kunnað um umsitingina av stuðlinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum umvegis vinnunevndina og fíggjarnevndina til at taka undir við hjáløgdu nýggju reglugerð.

**Vinnunevndin 14. mai 2019:** Nevndin tekur undir við tilmælinum við hesum broytingum, at annar stuðul omanfyri kr. 15.000 skal fyri í vinnunevndini, og at broyta reglugerðina grein 2 stk 1. punkt 2 Kommunan letur stuðul til  tiltøk við í minsta lagi 50 luttakarum, harav minst 50% eru útlendingar.Vinnunevndin beinir málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 106/19 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla

og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.

- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.*"

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

## I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

## II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

## III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygningina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at bygningin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura

heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 107/19 Fyribilshølini hjá Velbastaðar skúla, leingjan av leigumáli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 100/19 | 18/04440-12 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 20.05.2019 | 4/19 | 18/04440-12 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 76/19 | 18/04440-12 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 107/19 | 18/04440-12 |

**Upprunin til málið:**
Umbøn frá Tórshavnar kommunu at leingja leigusáttmálan

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur síðani 2007 havt leigusáttmála við Búnaðarstovuna um øki á 400 $m^2$, sum fyribilshølini hjá Velbastaðar skúla standa á. Núverandi leigusáttmáli er gingin út, og uppskot til nýggjan leigusáttmála er gjørt. Sáttmálin er galdandi í 5 ár. Árliga leigan er 500 kr. Haraftrat skal Tórshavnar kommuna rinda 1.500 kr. fyri tinglýsing og fyri avgreiðslu av leigumálinum.

Uppskot til leigusáttmála er hjálagt

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki at viðmerkja

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Uppskot til leigusáttmála er hjálagt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja leigusáttmálan og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina og staðbundnu nevndina fyri Kirkjubø/Velbastað.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 20. mai 2019:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 108/19 Leigumál um goymslu til Tórshavnar býarsavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 152/19 | 19/02083-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 108/19 | 19/02083-1 |

**Upprunin til málið:**
Býarsavnið hevur tørv á nýggjum hølum til goymslu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður til mál 17/01122 Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni. Í málinum er lýst tørvur á goymslu, tí verandi goymsla er ov lítil og ikki væl egnað til endamálið. Arbeitt hevur verið við ymsum loysnum bæði í kommunalum ognum og privatum, eisini soleiðis, at lutir hjá býarsavninum kunnu savnast í somu goymslu.

Mentamálanevndin tók á fundi undir við uppskoti at gera leigusáttmála um goymsuhøli á Smyrilsvegi 4, eigari Sp/ Matr.nr. 1326p, Tórshavn. Talan er um 342 fermetrar, ið lúka øll krøv til varðveitslu av savnslutum umframt arbeiðsumstøður til savnsfólk.

Uppskot til leigusáttmála fyri eitt 10 ára tíðarskeið fyriliggur nú. Árligi leigukostnaður er kr. 239.400 (kr. 700 fermeturin), ið verður prístalsviðgjørdur frá 1. oktober 2020 samsvarandi prístalinum hjá Hagstovu Føroya, tó minimum 1,5% um árið. Aftrat koma el- og hitaútreiðslur v.m.

Samstundis verður verandi leigumál um goymslu hjá býarsavninum í Slættanesgøtu sagt upp. Netto er talan um eina hækking í leiguútreiðslum til goymslu uppá kr. 155.400 árliga, ið hædd má leggjast fyri í fíggjarætlanini 2020.

Leigukostnaður fyri tíðarskeiðið oktober-desember 2019 verður goldin av játtanini hjá býarsavninum konta 5510.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leigusáttmálin er løgfrøðiliga eftirkannaður.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/01122 Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja leigusáttmálan og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við ætlanini

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Turid Horn, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá einum minniluta, Hallu Samuelsen, Tróndi Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at broyta leigusáttmálan soleiðis, at hann kann uppsigvast við 6 mánaðar freist frá leigarans síðu.

Broytingaruppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, sjey ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Turid Horn, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 109/19 Reingerð til fólkapensjonistar í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 19.03.2019 | 6/19 | 19/01090-1 |
| 2 Eldranevndin | 13.05.2019 | 12/19 | 19/01090-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 129/19 | 19/01090-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 109/19 | 19/01090-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur fyri fíggjarætlanina 2019 havt ynski um at uppraðfesta heimatænastuna við m.a. at gera eina eyka rutu. Harafturat bleiv á fíggjarætlanini fyri 2019 settar 500.000 kr. av til betran av heimatænastuni. Politiskt ynski er um, at hesir pengar skulu nýtast til reingerð hjá fólkapensionistum.

Fyri áleið 10 árum síðani var reingerð ein partur av tí tænastu sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð bleiv tá tikin úr tí tænastu, sum heimatænastan veitir og hevur ikki verið partur av tænastuni síðan.

Gjøgnum øll árini hava røddir tó verið frammi um saknin av hesari tænastu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin hevur arbeitt við at gera eina skipan, sum tryggjar at serligur bólkur av borgarum, kunnu fáa tilboð um reingerð í heiminum. Talan verður um royndarverkætlan fyri 2019.

Vegna trot á starvsfólk ber ikki til at leggja hesa uppgávu afturat verandi uppgávum hjá heimatænasuni.

Umsitingin hevur tí verið í samband við 5 fyritøkur og spurt um prís og um áhugan fyri uppgávuni og um hvussu uppgávan kann skipast.

Viðvíkjandi kostnaði er lítil munur á fyritøkunum, heldur sæst munurin á hvussu reingerðin kann skipast í praksis hjá borgarunum.

Royndarverkætlanin verður skipa soleiðis, at tað eru teir borgarar (fólkapensionistar), sum ikki megna sjálvir at gera reint og sum eftir skipanini um heimahjálp hava rætt til ókeypis heimahjálp, sum kunnu fáa reingerðartænastu frá Heilsu- og umsorganartænastuni.

Serstakt umsóknarblað verður til reingerðartænstuna. Umsóknarblað verður tøkt á heimasíðuni. Visitatiónin kann eisini hjálpa borgaranum at útfylla umsóknarblað. Tá umsóknarblað er móttikið ger visitatiónin eina meting av, um umsøkjarin lýkur treytirnar fyri, at fáa reingerðartænstu frá Heilsu- og umsorgartænastuni. Tá avgjørt er, at umsøkjarin kann fáa reingerðartænastu verða praktisku viðurskiftini fingin uppá pláss og reingerðin sett í verk.

Møguleiki verður at velja at fáa tænastu eina ferð aðru hvørja viku ella eina ferð fjórðu hvørja viku.

Brúkaragjald verður sett á tænastuna eins og á aðrar tænastur hjá heilsu- og umsorganartænastuni t.d. matartænastuna. Tey sum hava rætt til reingerðartænastu eru fólkapensjónistar, ið ikki kunna gera reint sjálvi.

Viðkomandi skal hægst tjena 15.000 kr. afturat fólkapensjónina við samhaldsfasta.

Fyri hjún má ársinntøku í mesta lagi vera 22.500 kr. útyvir fólkapensjón og samhaldsfasta.

Sum tummilsregla verður ikki latin stuðul til reingerð til fólkapensjonistar, sum búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella øðrum vaksnum fólki, yvir 18 ár, ið eru før fyri at gera reint.

Borgari sum fær reingerðartænastu avtalar sjálvur, ella í samráð við visitatiónina, við reingerðarfyritøkuna, hvat ein ynskir at fáa gjørt reint.

Tá borgarin far endaliga játtaðan stuðul til reingerð, skal viðkomandi undirskriva serstakt skjal, ið gevur loyvi til sjálvvirkandi gjald av tænastuni, umframt loyvi til, at Heilsu- og umsorganartænastan kann úvega skattaupplýsingar hjá borgaranum.

Er ein borgari ónøgdur við tænastuna, verður hann í fyrstu syftu, at taka tað upp við reingerðarfyritøkuna.

Førir tað ikki á mál, skal borgarin boða móttøkuni í umsitingini frá á mail: heilsuhusid@torshavn.fo ella telefon: 302000

Verkætlanin verður eftirmett í septembur við atliti til framhald komandi fíggjarár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorganartænstuni mæla eldranevndin til at taka undir við omanfyri lýstu royndarverkætlan og geva umsitingini heimild at gera samstarvsavtalu við umrøddu reingerðarfyritøku.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sambært kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. hevur kommunan heimild í § 10 at krevja gjald frá borgarum fyri tænastur og tilboð, sum verða veitt sbr. § 10 í lógini.

Eftir nærri kanning av leistinum fyri reingerðartænastu, metir kommunufelagið ikki, at kommunan hevur heimild at nýta inntøkuna hjá borgaranum sum grundarlag fyri, um borgarin kann fáa reingerðartænastuna ella ikki. Hinvegin skal kommuna gera eina fakliga tørvsmeting og staðfesta ein tørv, fyri at veita reingerðartænastu. T.d. at hetta er ein tænasta sum verður veitt borgarum sum eru óhjálpnir og ikki hava møguleika á annan hátt at fáa gjørt reint í heiminum.

Sostatt verður gjørd ein broyting í royndarverkætlanini soleiðis, at allir fólkapensionistar hava møguleika at søkja um reingerðartænastu uttan mun til inntøku.
Á sama hátt, sum til alla aðra tænastuveiting til heimatænastuna, ger visitatiónin eina ítøkilig fakliga grundaða tørvsmeting av tørvinum hjá tí einstaka umsøkjaranum í mun til hvørt reingerðartænasta verður veitt.

Skipanin annars av reingerðartænastuni og brúkaragjald er lýst nærri fyrr í málinum og verður verðandi óbroytt.

Av tí at ein partur av tilmælinum er ásetan av brúkaragjaldið skal hesin parturin leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til samtyktar.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla eldranevndini til at taka undir við broytta leistinum av reingerðartænastuni, sum lýst omanfyri.

Heilsu- og umsorganarstjórin og fakligi dygdarmennarin í Heilsu- og umsorgarnar-tænastuni mæla eldranevndini til at taka undir við, at brúkaragjaldið verður ásett til 300 kr. fyri hvørja reingerð og at leggja brúkaragjaldið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 13. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá minnilutanum, Anfinni Brekkstein, Tróndi Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Helenu Dam á Neystabø og Hallu Samuelsen: Mælt verður til at taka undir við málinum við teirri broyting, at egi/ngjaldið verður strikað.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Turid Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

## 110/19 Loyvi at leggja alminiumtak á randarhúsini á Niðaragøtu, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 65/19 | 19/00974-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 131/19 | 19/00974-9 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 110/19 | 19/00974-9 |

**Upprunin til málið:**
Eigari av einum av randarhúsunum inni á Gøtu hevur søkt kommununa um at skifta eternit-tekjuna út við aluminium orsakað av at eternit-tekjan fer ov skjótt.
Eisini hevur eigarafelagið inni á Gøtu skrivað eina formliga umsókn og biðið um loyvi at brúka eitt betri hóskandi slag av takplátum tí eternit-takpláturnar, sum tey sambært skeytinum eru bundin til at nýta, halda í alt ov stutta tíð.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Randahúsini inni á Gøtu hava eina skeytisáseting um slag av tøkum. Hesi tøk eru tey somu sum eru nýtt til randarhúsini millum Gilja.

Millum Gilja hava tey søkt um at brúka annað slag av taki og hevur tað málið verið ígjøgnum eina bæði umsitingarliga og politiska viðgerð. Fíggjarnevndin loyvdi at víkja frá servituttinum, við teirri treyt, at sami litur og profilur eru í takinum sum nú.

Í tí sambandi kannaði umsitingin um tað eru onnur tøk sum líkjast eternit B6 takplátum og tað vísti seg, at Plannja sinus 51 aluminiums takplátur hava sama profil og kunnu fáast í sama liti sum ásettu takplátur. Eisini spurdi umsitingin seg fyri hjá seljara, um eternit B6 plátur vóru dygdargóðar og haldgóðar, men hildið var ikki at dygdin er nóg góð.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt eru ognirnar fevndar av ásetingum í skeytinum

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**
Mál nr.: 17/03078-3 Málslýsing – úr málinum «....Áheitan um kommununnar góðkenning fyri - sum átalurætthavari – at fáa loyvi at skifta takið».

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ynski um at góðkenna annað slag av taki enn tað sum er lýst í servituttinum. Fyri øll randarhúsinum inn á Gøtu.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Møguligar viðmerkingar koma seinni.

**Skjøl:**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Vísandi til at fíggjarnevndin hevur givið eitt tilsvarandi loyvi til randarhúsini millum Gilja, mæla tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini til at víkja frá servituttinum við tí treyt, at omanfyri nevndu aluminiums plátur verða brúktar við sama profili og liti sum núverandi tøk og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 111/19 Broyting av almennu byggisamtyktini, Dalurin Langi, matr. nr. 138a, Hoyvík frá A3 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 5/19 | 18/04229-1 |
| 2 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 20/19 | 18/04229-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 88/19 | 18/04229-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 111/19 | 18/04229-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar býráð samtykti á fundi tann 20. juni 2017 nýggja bústaðar útstykking, Stórubrekku, í tí sambandi er ynski at fáa Dalin Langa lagdan um til fríøki. Fyri at tryggja eitt grønt umhvørvi millum býlingarnar Stórubrekku og Myllutjørn, ið er til gagns fyri almenningin. Dalurin Langi skal vera eitt hugtakandi og spennandi samanhangandi grønt øki, ið er lætt at greina og fata, ið tryggjar almenninginum fjølbroytt fríøkir ímillum býlingarnar.

Fyri at fremja hetta átak, er neyðugt við tillagingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Skipa økið um, Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki.

Økið, sum broytingin fevnir um, liggur í A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting* og *2 - Dalurin Langi eftir broyting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari bygisamtykt fyri økið.*

*2 Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*1 Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2 Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3 Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m2 fyri stakhús, 300 m2 fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.*

*4 Byggistig 0,3*

*5 Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m2, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6 Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7 Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8 Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9 Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- 17/01822 Klik her for at angive tekst.
- Sí *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *1 - Dalurin Langi áðrenn broyting, journal nr. 18/04229-2.*
- *2 - Dalurin Langi eftir broyting, journal nr. 18/04229-2.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina um uppskotið at skipa økið um. Dalin langa frá A3, bústaða- og miðstaðarbygging til D1, fríøki, hevur Tórshavnar kommuna fingið tvey mótmælisskriv, við viðmerkingum og broytingaruppskotum. Sí skjal *Mótmæli og broytingaruppskot til byggisamtyktina, Dalurin Langi* og *Mótmæli frá eigarafelagið við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.*

Umboð fyri grannaognir og eigarafeløg seta í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

**Mótmæl 1, grannaognir: Ólivantsgøta 18 og Dýrindalsgøta 16**

1. Frágreiðingin í kunngerðini, vísandi til endamálið er misvísandi í mun til hvørjir býlingar fara fáa ágóða og ávirkan av fríøkinum.
2. Ivamál vera sett til hví ovara parti av fríøkinum, ikki fylgir matr.nr 135kg og 135kr á vestaru síðu av dalinum. Mælt verður til at vaksa um fríøkið, so tað liggur heilt uppat matr.nr 135kg og 135kr.
3. Ivamál vera sett um kommunan heldur ovara part av dalinum tøkan til komandi býggiverkætlanir eystan fyri matr.nr 135kg og 135kr, ístaðin fyri at taka hetta uppí sum fríøki. Tí bygging í hasum økinum kemur at vera neilig og órógva skipan av verandi útstykking og ognunum á matr.nr 135kg og 135kr.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið:
Add.1. Tá Hoyvíkshagi Suður ella Hoyvíkshædd, ið býlingur eitur í dag, bleiv planlagdur var lova, at Dalurin Langi skuldi leggjast út sum fríøki (D1). Tó er eingin broyting av byggisamtyktini farin fram fyri at tryggja økið sum fríøki, sum í dag liggur sum byggiøki. Nú vil man tryggja Dalin Langa sum fríøki, bæði í mun til verandi býlingar og komandi býlingin á Stórubrekku. Tað er av misgáum at Hoyvíkshædd ikki er nevnd í kunngerðini av málinum, tí sjálvsagt er býlingur tonktur, sum ein av brúkarum av fríøkinum.

Add.2. Umsitingin hevur kannað viðurskiftini og avgjørt at fylgja tilmælinum. At veksa um fríøkið, so tað kemur heilt uppat matr.nr 135kg, 135kr. og 135nt. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

Add.3. Tað liggur ein ætlan um at leggja ovara part av dalinum út sum byggiøki til ein framtíðar stovn. Økið liggur frammanundan sum A3 øki, ið loyvir stovnsvirksemi.
Vísandi til add.2 so verður ein grønur geiri frá Ólivantsgøtu niðan við matr. nr. 135kg, 135kr. og 135nt og niðan á ringvegin, Klingran. Hesin geiri skal tryggja eina rímiliga frástøðu millum matriklarnar og komandi stovn. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

**Mótmæl 2, eigarafelagið við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.**

1. Fýlst verður á at økið, ið er lagt út til fríøki, er ov lítið. Økið rúmar bert sjálva gøtuna og brattar skáar báðu megin. Tað rúmar ikki spæl og upphald, tískil ber tað ongan dám av frílendi.
2. Útstykkingin á Stórubrekku kemur at oyðileggja trø, ið eru plantað í økinum fyri stuttum.
3. Sambandið millum býlingarnar vestan fyri Dalin Langa og komandi frílendi og ítróttarøki (Stóru Tjørn) vestan fyri búsetingina Inni á Gøtu, verður kvett.
4. Eitt broytingaruppskot er útvegað, har víst verður til at fríøkið skal vaksa munandi, markið kemur at leggja seg tætt uppat matriklunum í nærumráðnum, vinnuøkinum eystan, ringvegnum Kringlan og sjálvum heygginum.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið:
Add.1. Umsitingin hevur kannað viðurskiftini og avgjørt at fylgja tilmælinum. Við at veksa um fríøkið. Tó eru ongar ætlanir um, at skipa/programmera økið stórvegis. At brattir skráar eru, verður sæð sum ein dygd í økinum. Hesir skráar geva lívd til gøtuna og bjóða til spæl og forvitni hjá børnum.

Add.2. Við at vaksa um fríøkið, verður ikki neyðugt at taka øll trø burt, tó kann væntast at nøkur mugu takast burt kortini.

Add.3. Ætlanin sum Stóru Tjørn liggur á tekniborðinum, men har er enn langur vegur fyri framman. Tí er trupult at vísa til nakað ítøkiligt, tá talan verður um frílendi og ítróttarøki í hasum umráðnum.
Tó við at skipa fríøkið, sum nú er ætlað Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi*, verður ein grønur geiri tryggjaður ígjøgnum dalin, við streingjum til býlingarnar Inni á Gøtu og Stóru Tjørn.

Add. 4. Sum kunnað so fer kommunan at fylgja tilmælinum við at veksa um fríøkið.
Tað liggur ein ætlan um at leggja ovara part av dalinum út sum byggiøki til ein framtíðar stovn. Økið liggur frammanundan sum A3 øki, ið loyvir stovnsvirksemi.
Ein grønur geiri kemur at leggja seg fram við eystaru síðu á Hoyvíkshædd. Hesin geiri skal tryggja eina rímiliga frástøðu millum matriklarnar og komandi stovn, eins og samband við norðaru býlingarnar Inni á Gøtu og Stóru Tjørn.
Sami geiri kemur at leggja seg fram við økinum, ið komandi umlættingar- og rehabiliteringsdepil v. Rólandsgøtu skal staðsetast. Síðani fylgja matriklunum við Mylnutjøn og oman til Hoyvíkar Skúla og ringvegin, Vegurin Langi. Markið verður flutt longur niðan á heyggin, ið uppskotið vísir til. Sí skjal: *Nýtt kort_Dalurin Langi.*

**Skjøl:**
*Journal nr.:18/04229-7* Mótmæli og broytingaruppskot til byggisamtyktina, Dalurin Langi.
*Journal nr.:18/04229-12* Mótmæli frá eigarafelagnum við Myllnutjørn, Hoyvíkshædd, Inni á Gøtu og Maritugøtu.
*Journal nr.: 18/04229-13* Nýtt kort_Dalurin Langi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingaruppskotið, og harvið samtykkja broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og fimm blonkum atkøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen.

## 112/19 Útstykking Stórabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 138/17 | 17/01822-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 160/17 | 17/01822-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 172/17 | 17/01822-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 202/17 | 17/01822-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2018 | 278/18 | 17/01822-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 87/19 | 17/01822-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 142/19 | 17/01822-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 112/19 | 17/01822-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 17/01822-1 |

**Málslýsing:**
Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Ynski er nú um at seta í verk eina útstykking á hesum sama øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin viðvíkjandi framtíðar bygging, og er ynski um at gera eina øðrvísi útstykking á økinum við blandaðum bústøðum. Sum sæst niðanfyri, so skal serstøk byggisamtykt gerast fyri útstykkingina við Dalin Langa, sum umframt at tryggja skilagóða bygging, er við til at staðseta byggingina, atkomu, parkering, fríøki v.m.

Men fyri at seta skjøtul á arbeiðið at fyrireika útstykkingina við Dalin Langa er neyðugt at byrja við eini byggiskrá fyri økið, sum lýsir, hvør bygging talan er um. Tískil verður biðið um, at nevndin góðkennir at farið verður undir at gera eina byggiskrá fyri økið, umframt at bjóða sniðgevingina av útstykkingini út til ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, verður í kommunuætlanini nevnt “Heyggurin” og er 5,1 hektarar til støddar, sí skjalið “Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort”. Harafturat liggur økið, sum er partur av matr. 138a, í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

*1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

*2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

*3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ fyri stakhús, 300 m$^2$ fyri tvíhús og 250 m2 fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 m$^2$ fyri hvørt grundstykki.*

*4. Byggistig 0,3*

*5. Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m$^2$, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m$^2$ og 500 m$^2$ verða sett javnt minkandi niður til vanliga ásetta minstuvídd. Í serstakari byggisamtykt kann nýtslustigið verða roknað út frá heildarbyggingini í mun til eitt náttúrliga avmarkað øki.*

*6. Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd. .*

*7. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.*

*8. Er hægsta punkt við útvegg meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd, sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.*

*9. Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

**Skjøl:**
- Økið eystan fyri Dalin Langa_Kort

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin kann fara undir at gera eina byggiskrá fyri útstykkingina, umframt at játta kr. 200.000 av kt. 6475 til sniðgeving av útstykkingini og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
SNA Arkitektar hava gjørt eitt uppskot til byggiskrá og skipan av økinum. Sí uppskotið *Stórabrekka-byggiskrá_06122018.*

Økið á Stórubrekku liggur í 100 m hædd og hevur stórsligið útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Frá miðbýnum í Havn og niðan til nýggju staðsetingina á Stórubrekku eru fimm kilometrar, og eru handilsmøguleikar, skúlar og stovnar í nærumhvørvinum.

Stórabrekka liggur á eini høvd omanfyri vinnuøkið við Vegin Langa. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn.

Uppskotið, sum SNA Arkitektar hava gjørt, arbeiðir við einum nýggjum býlingi, ið leggur seg júst millum hendan dalin vestanfyri og lendisfallið eystanfyri. Býlingurin er hugsaður sum klingrubygging í trimum fríttliggjandi eindum, har lagt verður upp fyri, at uppruna lendið verður varðveitt og gerst ein stórur partur av býlinginum.

Tær tríggjar eindirnar í klingrubyggingini verða bundnar saman við eini innara vegaskipan við parkering, og eitt øki til felagsparkering er staðsett við innkoyringina til býlingin úr Klingruni. Ein gøtuskipan, ið knýtir seg á verandi lendisgøtuskipan, bindur somuleiðis alt økið saman, og skilja hesar gøturnar seg frá koyrandi ferðslu, so tað framhaldandi verður trygt hjá fólki til gongu.

Klingruskapini verða myndað sum røðir av raðhúsum, har allar bústaðareindirnar fáa útsýni antin út á fjørðin ella móti vakra landslagnum í dalinum, umframt at allar bústaðareindirnar fáa eina síðu við lívd og nærleika. Í miðjuni á hvørjum klingruskapi eru hægri punkthús við íbúðum, har mestsum øll síggja uppum raðhúsini.

Klingruskapini við raðhúsunum eru náttúrliga staðsett í mun til lendið, soleiðis at innara landslagsrúmið liggur hægri, og er tað á hesum hálendinum, at parkeringin er staðsett inni undir langum flagtekjum. Heyggur og grøn øki mynda sostatt økið og skiftið millum raðhúsini, íbúðarbyggingina og parkeringina.

Ymiskt er, hvussu nógvir bústaðir eru í hvørjum klingruskapi, men í fyrsta klingruskapi, sum er hugsað sum fyrsta byggistig rúmast:

- 19 bústaðir í raðhúsi
- 18 íbúðir í punkthúsum
- 28 íbúðir í raðhúsum
- felagsrúm
- dagstovnur

Tá bygt verður tætt, verður mett, at 1,5 bilur til hvørt húskið er nøktandi. Byggisamtyktin setur krav um 1 p-pláss fyri hvørjar 75 $m^2$ íbúð í eini felagsparkering.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við málið *Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019*, journal nr. 18/03848, verður málið at leggja fyri á komandi býráðsfundi at samtykkja at staðseta ein nýggjan dagstovn á Stórubrekku. Víst verður á eitt øki á eystaru síðu á Stórubrekku. Í hesum sambandi hevur tekniska deild gjørt viðmerkingar til málið, umframt at víst verður á vega- og kloakkíbindingar v.m., sí kortskjalið.

**Skjøl:**
Stórabrekka-byggiskrá_06122018, journal nr. 17/01822-8
Staðseting av nýggjum og víðkan av verandi dagstovnum 2019, journal nr. 18/03848-1
Dagstovnur_Stórabrekka_Vegaíbinding_Kloakkíbinding, journal nr. 18/03848-9

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja skipanaruppskotið sum ætlan fyri Stórubrekku, og at umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina uppskotið, áðrenn málið aftur verður at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2018:** Nevndin var á staðnum og kunnaði seg um viðurskiftini.
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Hóast tað var vanligt at búgva tætt saman, so hevur tað í Havn verið óvanligt at byggja húsini saman. Tað eru nógvir fyrimunir við at byggja tætt og lágt, tí tað krevur minni lendi, styttri vegir og leiðingar, betri lívd til vøkstur og tilhald úti, felagsøki, spælipláss og samskifti við onnur.

Fyrst 1950 árunum vórðu raðhús bygd fram við Jóannesar Paturssonar gøtu, og seinni hava vit somuleiðis sæð raðhúsabygging í eysturbýnum m.a. við Bókbindaragøtu, í Tórsbyrgi og á Berjabrekku. Men í 1990 árunum tordi kommunan at gera eina nýggja roynd at byggja tættari bústaðir. Grundin og eldverjuveggir vórðu bygd fyrst, og síðani kundi tann einstaki keyparin taka við og byggja sjálvur og soleiðis seta sín egna dám á innan fyri felags karmarnar. Talan er um tær báðar raðhúsbyggingarnar Millum Gilja og Inni á Gøtu. Hesar byggingarnar eru samansettar av húsum, ið eru bygd eitt og eitt í senn. Úrslitið er ein fín javnvág millum fría valið hjá hvørjum einstakum eigara av innrætting, tilfari og litum og so felags heildina, sum støddir, tekjur og samanbyggingar hava við sær.

Skipanaruppskotið fyri Stórubrekku fevnir um trý klingruskap við ávikavist raðhúsum og íbúðum. Lagt verður upp til, at klingruskapið í miðjuni (byggistig 1), sum somuleiðis er størsta skapið av teimum trimum, verður skipað sum raðhúsabyggingin nevnd omanfyri, at grundin og eldverjaveggirnir fyrst verða gjørdir, og síðani seta einstøku keypararnir sín dám á bygginguna. Treytir viðvíkjandi skapi og útsjónd, sum skapa eina heildarmynd av byggingini, verða ásettar í serstaka byggisamtykt. Tað kann t.d. vera, at allar tekjurnar skulu vera eins fyri at skapa eitt samanhangandi strekki og heildarmynd fyri bygginguna.

Umrøtt hevur verið við Bústaðir at fara í samstarv um verkætlan at fremja byggistig 3 í verkætlanini, sí skjal yvir klingruskapini og byggistig 1-3. Bústaðir vístu áhuga fyri hesum samstarvi, og tí verður mælt til at fara undir eitt fyrireikandi samstarv.

**Skjøl:**
Stórabrekka_Byggistig 1-3, journal nr. 17/01822-13

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur, at fara í samstarv við Bústaðir um byggistig 3, við tí endamáli at selja økið til Bústaðir at byggja íbúðir á, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bjørg Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen: Mælt verður til at heimila umsitingini at innheinta tilboð frá ráðgevum uppá projektering av byggistigi 1 at leggja fyri nevndina aftur.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

# 113/19 Íbúðarbygging á Frúutrøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 45/18 | 18/00950-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 18/18 | 18/00950-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 79/18 | 18/00950-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 54/18 | 18/00950-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 84/18 | 18/00950-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 111/18 | 18/00950-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 71/18 | 18/00950-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 143/18 | 18/00950-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.05.2018 | 107/18 | 18/00950-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 241/18 | 18/00950-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 84/19 | 18/00950-1 |
| 12 Tekniska nevnd | 16.05.2019 | 33/19 | 18/00950-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.05.2019 | 151/19 | 18/00950-1 |
| 14 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 113/19 | 18/00950-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommmunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum, og at hetta skal gerast við býartætting, har byggilendi og tómir bygningar inni í býnum verða gagnnýttir til bústaðir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at verandi musikkskúli á Frúutrøð 1 flytur niðan í nýggja Musikkskúlan á Landavegnum við árslok 2018, og verandi læknavirksemi og býargartnari á økinum flyta í onnur høli, hevur umsitingin gjørt uppskot til útboðstilfar av Frúutrøð, matrikkul 645a, í optión. Uppskotið snýr seg um at bjóða lendi við verandi musikkskúla- og læknabygningi út til íbúðarbygging, har ein av treytunum er, at minst helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir, og í minsta lagi 10 av íbúðunum skulu vera eldra- og rørsluvinarligar íbúðir. Av tí at økið liggur miðskeiðis í býnum, er ynskiligt, at fríøkið ella partur av fríøkinum skal vera ein almenn atkomulig park til gagn fyri allan býin.

Uppskotið stuðlar væl undir visjónunum hjá kommununi, og við støði í fjølbroyttum eigaraviðurskiftum av íbúðum, verður lagt upp til búseting við einum breiðum borgaraskara. Harumframt er møguleiki fyri, at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum. Talan verður tískil um býartætting, gagnnýtslu av verandi infrakervi, umframt at gera eitt alment grønt øki/park miðskeiðis í býnum.

Hesin háttur at bjóða eina verkætlan út er ikki roymdur fyrr í kommununi. Ætlanin er, at kommunan setur ávísar treytir í útbjóðingartilfarið, og at tey sum bjóða uppá verkætlanina binda seg til at byggja, fíggja og umsita íbúðir og fríøki á økinum.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar. Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 1. ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Ætlanin er at bjóða optiónina/verkætlanina út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión). Í sambandi við eina prækvalifikatión, kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.

Økið, matr. 645a, sum talan er um, fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Havast skal somuleiðis í huga, at tá tosað verður um býartætting, so kann ein av avleiðingunum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram.

Neyðugt verður at skipa matrikkuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út. Hvussu hetta verður gjørt, verður treytað av parkeringsviðurskiftunum á matrikklinum. Í dag eru 41 almenn parkeringspláss á Frúutrøð. Mett verður, at verkætlanin ikki fær nøkta parkeringstørvin við teimum 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til íbúðirnar. Tískil verður tað ein uppgáva hjá kommununi at varðveita og skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.

Áðrenn útbjóðingina av verkætlanini skulu grannar hoyrast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at bjóða lendið á Frúutrøð, matr. 645a, út í optión til íbúðarbygging sambært útbjóðingartreytum, sum fyrisitingin ásetur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí treyt, at dagføringin av kloakkskipanini verður fíggjað av søluni og at kommunan útvegar sama tal av parkeringsplássum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum til at samtykkja málið við teirri treyt, ið nevndin hevur ásett, umframt teirri treyt, at tað bert skal verða loyvt at byggja tríggjar hæddir í økinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum at beina málið aftur í Byggi-og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
19. mars var ein kunnandi fundur um verkætlanina fyri grannum uttanum økið á Frúutrøð. Eftir fundin varð avgjørt at nágreina ymisk viðurskifti í útbjóðingartilfarinum, undir hesum:

- Nágreina treytirnar, sum innkomnu uppskotini skulu lúka (sí pkt. *3.3 Treytir til økið og bygging* í útbjóðingartilfarinum) m.a.:
    - Byggilist
    - Talið av íbúðum
    - Hædd á nýggjum bygningum (sum eru lægri enn verandi bygningur)
    - Tíðarætlan
- Broytt í punktunum sum uppskotini verða dømd eftir (sí Pkt. *3.4 Døming av innkomnum uppskotum* í útbjóðingartilfarinum)
- Broytt tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning (sí pkt. *4.2 Tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning)*
- Víðka dómsnevndina við einum granna frá Frúutrøð
- Avgjørt at mæla til at áseta eina samsýning hjá dómsnevndini at ráða yvir, áljóðandi kr. 200.000,-, sum verður javnt býtt millum undangóðkendu tilboðsgevararnar, sum ikki vinna.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at umrøða omanfyristandandi nágreiningar, at taka undir við útbjóðingartilfarinum, og at játta kr. 200.000,00 av konto 6175, fyri síðani at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Annfinn Brekkstein stemmar blankt

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at samtykkja málið við tí ískoyti, at í minsta lagi 30 % av íbúðunum skulu markast fólki, ið eru 60 ár og eldri.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atvkøða blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fleiri fundir við umboð fyri grannar á Frúutrøð, har teir hava havt framløgur um teirra ynskir til økið.

Umsitingin hevur við grundarlag í ynskjunum og avgerð í fíggjarnevndin 18. apríl gjørt fylgjandi broytingar í pkt. 3.3 Treytir til økið og bygginga:

- Øki sum verður bjóðað út er matrikul 645a. Um tilboðsgevari sær møguleika í at inndraga aðrar matriklar í grannalagnum sum ein part av tí samlaðu verkætlanini, er hetta eisini møguligt. Tó eru treytir til økið og bygginga einans galdandi fyri matrikul 645a.

- Møguleiki skal eisini vera fyri at gera luttaíbúðir. Helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir men hin helvtin kann vera eigara- og/ella lutaíbúðir.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stóri og virkandi býararkitektur mæla til at fíggjarnevndin samtykkir útbjóðingartilfarið og tær broytingar sum eru gjørdar fyri síðani at beina málið í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 18. mai 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, trimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Djóni Nolsøe Joensen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, ið atkvøddu ímóti vísandi til, at tað manglar ein heildarætlan fyri økið og grannalagið.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Av tí at eingi tilboð komu inn, tá Frúutrøð varð bjóðað út til íbúðarbygging, so hevur verið arbeitt við øðrum íbúðarbyggingum í kommununi. Men gundað á bústaðartørvin í kommununi hevur tað verið ynskiligt at fara undir hesa verkætlan aftur, og fyrst í árinum vísti Bústaðir áhugan í at fara undir eitt samstarv um hesa verkætlan.

Innleiðandi fundur varð hildin millum kommununa og Bústaðir, og tá varð avtalað, at teir vendu aftur við einum innleiðandi hugskoti fyri skipan av økinum. 07.03.2019 var aftur fundur millum umsitingina og Bústaðir, har MAP Arkitektar somuleiðis luttóku. Á fundinum var ein innleiðandi hugskotsætlan fyri skipan av Frúutrøð løgd fram saman við eini heilt yvirskipaðari kostnaðarmeting, sí journal nr. 18/00950-60.

Hugskotsætlanin fevnir um 4 ymisk uppskot til skipan av økinum. Hesi eru:

1. UMVP – uttan musikkskúlan og við p-kjallara:

- Talan er um 2700 bygdar fermetrar við 34 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
- Parkeringskjallarin verður í einum dekki gjørdur til 70 akfør, men í tveimum hæddum til 140 akfør.

2. VMVP – við musikkskúlanum og við p-kjallara:
   - Talan er um 2000 bygdar fermetrar við 25 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Parkeringskjallarin verður í einum dekki gjørdur til 70 akfør, men í tveimum hæddum til 140 akfør.
3. UMUP – uttan musikkskúla og við verandi parkering:
   - Talan er um 1700 bygdar fermetrar við 22 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Hetta hugskotið fevnir einans um verandi parkering, og verður mett, at ov lítið fæst burturúr við hesi ætlanini.
4. VMUP – við musikkskúla og við verandi parkering:
   - Talan er um 900 bygdar fermetrar við 12 íbúðum á 70 $m^2$ í tveimum hæddum.
   - Hetta hugskotið fevnir einans um verandi parkering, og verður mett, at ov lítið fæst burturúr við hesi ætlanini.

Tey fýra uppskotini hava verið umrødd í umsitingini, bæði í mun til hvussu nógvar búeindir og parkeringspláss fáast burturúr, umframt um musikkskúlin skal varðveitast, um borgarahús, sum eisini kann vera býarsavn ella partur av sama skal verða á staðnum o.s.fr.

Útfrá hesum, er umsitingin avgjørd um, at ynskiligt er at fara undir skipan av økinum, har útgangsstøðið verður tikið í uppskoti nr. 1, sum er uttan musikkskúlan og við p-kjallara.

Grundgevingin fyri valið er:
- At økið sýnist væl skipað við eini passaligari nøgd av bygningum í mun til fríøkið.
- At staðsetingin av bygningunum sum heild er væl skipað og út ímóti Jónas Broncks gøtu leggur uppskotið upp til, at byggilinjan út móti vegnum verður hildin ella kann man siga, at vegurin fær eina framsíðu út móti vegnum, sum verður mett at gagna heildarupplivingini úti á vegnum.
- At verandi parkeringsnøgd verður varðveitt, umframt at víst er á møguleikan at gera eini 100 parkeringspláss afturat teimum verandi við at gera parkeringskjallaran í tveimum hæddum.

Tað skal tó nevnast, at hetta er eitt yvirskipað innleiðandi hugskot, og í eini møguligari framhaldandi tilgongd kann skipanin broytast rættiliga nógv.

Enn er kostnaðarmetingin so yvirskipað og óítøkilig, at mett verður ikki at hon er sannførandi á núverandi støði og skal hendan og býtið av kostnaðinum nágreinast í framhaldandi tilgongdini.

Bústaðir hava víst á ynski um at skipa verkætlanina á líknandi hátt, sum samstarvið við Finsen varð skipað. Í hesum sambandinum verður neyðugt at nágreina leiklutin hjá báðum pørtunum nærri.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til,
- at umsitingin arbeiðir víðari við at nágreina samstarvið við Bústaðir í einum partalagssáttmála,
- at játtaðar verða 400.000 kr. av konto 6475, L00002, Framfluttur løgurkarmur, til at gera eina masterplan av økinum, umframt
- at gera boriroyndir og kunnandi tilfar til grannarnar í økinum, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam taka ikki undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 16. mai 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Turið Horn og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við tí ískoyti, at eitt ávíst tal av íbúðum í verkætlanini skal markast til eldri borgarar. Hetta verður at áseta nærri í samstarvsavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við ætlanini.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

# 114/19 Umsókn um yvirtøku av privatum vegi ovara part av Perskonugøtu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 40/16 | 16/00394-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 141/16 | 16/00394-3 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 117/16 | 16/00394-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 11.09.2018 | 50/18 | 16/00394-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 132/19 | 16/00394-3 |
| 6 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 114/19 | 16/00394-3 |

**Málslýsing:**
Ánararnir av vegnum ovast í Perskonugøtu, hava søkt um at kommunan yvirtekur vegøkið, sum er partur av matr. nr. 912a, Tórshavn, ið er óbygd trøð umleið 12.447 fermetrar til víddar.

Umsøkjararnir vísa til, at teir hava havt ætlanir um at gera eina útstykking í Perskonugøtu, men hetta hevur verið darvað av tí privata vegnum og tí standi hann er í, og hugsa sær eina tilgongd, har vegurin verður yvirtikin og samstundis verður ein ætlan gjørd fyri vegin, soleiðis at útstykkingarætlanin kann førast út í lívið.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00394-2).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegøkið í 8 m breidd, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Av tí at málið kann tulkast á ymiskan hátt, soleiðis at umsøkjarin skilir tað, at kommunan vil yvirtaka vegin uttan kostnað fyri umsøkjaran og at kommunan tulkar samtyktina sum at umsøkjarin dagførir vegin, áðrenn kommunan yvirtekur vegin, sum vanlig mannagongd er, verður málið lagt fyri nevnd enn einaferð, fyri at fáa staðfest hvør hevur skyldu at dagføra vegin.

Havast skal í huga, at nú Glasir er tikið í nýtslu, er ferðslan niðan Perskonugøtu vaksin og kemur kanska at vaksa enn meiri. Umsøkjarin ynskir ikki at gjalda fyri at fáa vegin dagførdan. Hinvegin eigur hesin vegur helst at verða kommunalur.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at semja verður gjørd við umsøkjaran, at kommunan yvirtekur vegin kostnaðarfrítt og hartil skyldurnar at fáa vegin dagførdan. Sí støðulýsing og kostnaðarmeting sum víst verður til í málslýsingini. Vegurin verður tó ikki dagførdur, fyrr enn neyðug fíggjarlig orka verður sett av til verkætlanina.

**Tekniska nevnd 11. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 115/19 Fyrispurningur um loyvi at fáa brúksrætt, leiga ella keypa øki framman fyri matr. nr. 1424 til parkering

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2017 | 24/17 | 16/04358-4 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 79/17 | 16/04358-4 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 30/19 | 16/04358-4 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 83/19 | 16/04358-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 141/19 | 16/04358-4 |
| 6 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 115/19 | 16/04358-4 |

**Málslýsing:**
Søkt verður um at fáa brúksrætt, leiga ella keypa øki til parkering.

Umsøkjararnir búgva á Gundadalsvegi 37, eiga matr.nr. 1424. Grundstykkið, sum sethúsini standa á, er 375 fermetrar til støddar.

Sambært umsókn 20.11.16 stendur m. a.:
"*Parkeringsviðurskiftini á okkara matrikli eru ikki nøktandi. Á okkara egna øki hava vit eitt lítið parkeringspláss, men eru vit tá bundin av at nýta koyrivegin, sum grannar okkara á Gundadalsvegi 33 og 35 eiga, matr.nr. 1421 og 1423.*
*Fram við Gundadalsvegnum, framman fyri húsunum hjá okkum, er eitt petti av vegi, sum endar í eystasta horninum í garðinum hjá okkum á matr.nr. 1425. Hetta stykki av vegi sýnist náturligt at brúka til parkering framman fyri húsum okkara, (sí tann bláa kílan, sum er á tekningini)*"

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at selja 26,5 m$^2$ burtur av vegaøkinum, sambært uppskoti 16/04358-3, treytað av at umsøkjarin skipar p-økið inni á hesum øki og egnari ogn og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevnd at selja lendið fyri 1.100 kr/m$^2$.

Keyparin rindar harumframt allar útreiðslur sum eru til avgreiðslu av málinum herundir útreiðslur til matrikulering og møguligar aðrar útreiðslur.

**Ískoyti:**
Hin 4. apríl 2017, samtykti tekniska nevnd at selja 26,5 m$^2$, burtur av vegaøkinum, sambært uppskoti 16/04358-3, treytað av at umsøkjarin skipar p-økið inni á hesum øki og egnari ogn.

Kortið, sum málsviðgerin vísir til, umfatar eitt øki á 16,5 $m^2$ og umfatar samtyktin tískil hesar 16,5 $m^2$. (Talan er um eina slagvillu, tá man samtykkir at selja 26,5 $m^2$, tí rætta víddin er sum kunnugt 16,5 $m^2$).

Síðani hevur verið samskifti við umsøkjaran, sum nú ynskir at kunna keypa 28,5 $m^2$, burtur av vegaøkinum, sí kortskjal 16/04358-9.

Umsøkjarin vísir til at tað er er trupult at skipa parkeringspláss á egnum øki, og ynskir at kunna keypa 28,5 m2, soleiðis at tað letur seg gera at parkera tveir bilar frammanfyri húsini. Málsviðgeri í teknisku deild, metir at tað saktans ber til at broyta markið sambært kortskjali 16/04358-9, og metir tekniski stjórin út frá hesum, at kommunan eigur at leggja málið fyri aftur. (Sí samskifti 16/04358-10).

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til at selja 28,5 $m^2$ burtur av vegaøkinum, sambært kortuppskoti 16/04358-9, treytað av at umsøkjarin skipar p-økið inni á hesum øki og egnari ogn og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevnd at selja lendið fyri 1.100 kr/$m^2$.

Keyparin rindar harumframt allar útreiðslur sum eru til avgreiðslu av málinum herundir útreiðslur til matrikulering og møguligar aðrar útreiðslur.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 116/19 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki í Havnardali, frá 4. Grundumráði til D2 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 75/19 | 19/01598-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 116/19 | 19/01598-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna undirskrivaði í 2010 avtalu við Skótalið KFUM's um brúksrætt til eitt øki, sum er uml. 3300 $m^2$ til støddar og er partur av matr. nr. 1160a, Tórshavn, sí skjal *Málslýsing*.

Á økinum hevur skótaliðið bygt eina smáttu og hava tey annars brúkt økið til at venja ymisk skótakynstur. Skótaliðið ynskir at skipa eitt aktivitetsøki kring smáttuna og á vári 2019 staðfesti byggieftirlitið, at arbeiðið at gera aktivitetsøki var byrjað – teir vóru byrjaðir at grava, gjørt vollar og ymiskt annað á staðnum, uttan at hava fingið loyvi til tess, sí skjal *Skitsa yvir økið*. Av tí at slíkt arbeiði má javnsetast við bygging og tískil krevur byggiloyvi, fekk skótaliðið boð um at steðga. Sí skjal *Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 27.03.2019 kl. 13:00, sum greiðir frá støðuni*.

Økið liggur í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært ásetingunum fyri økið, kann slíkt virksemi ikki loyvast í økinum.

Harumframt hevur Tórshavnar kommuna fingið umsókn um loyvi til at víðka um rossavirksemið í Havnardali, og krevur hetta, at byggisamtyktin verður broytt, sí skjal *Samtykt Býráðsfundur, 13.12.2018 kl. 18:00*.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum skótaliðið hevur brúksrætt til, liggur nær rossavirkseminum í Havnardali, sum liggur í D2 øki, ætlað ítrótti og tílíkum.

Í sambandi við at endurskoða almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu var ætlanin, at víðka um D2 øki í Havnardali, soleiðis at tað eisini fevndi um aktivitetsøkið hjá skótaliðinum. Teir hava frammanundan brúksrætt til økið, og mett verður, at slíkt virksemi hóskar seg væl í náttúruvakra umhvørvinum, sum frammanundan hýsir øðrum fríluftsvirksemi.

Somuleiðis er ynski at víðka um rossavirksemi í Havnardali, m.a. við at gera eina nýggja kappríðingarbreyt. Í tí sambandi má partur av 4. Grundumráði og D1 økinum í Havnardali broytast til D2 øki. Sí skjal *Uppskot til ummatrikulering*.

Grundað á hesi viðurskiftir verður mælt til at fremja broytingarnar beinanvegin, í staðin fyri at bíða eftir málinum um endurskoðan av almennu byggisamtyktini, sí skjal *Eftir broyting*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri D1 øki eru m.a.:
*§23, stk. 1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstkarai byggisamtykt fyri økið.*

Ásetingarnar fyri D2 øki eru m.a.:
*§23, stk 3. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

Ásetingarnar fyri 4. Grundumráði eru m.a.:
*§26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*
*Stk. 2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Ólóglig bygging millum Tjarna í Havnardali við rossafjósini – KFUM (2013-2131)* – journal nr. 14/04143.
*KFUM, Bogi F. Sigurstein vegna skótalið KFUMs: Umsókn til eitt øki til eina smáttu og til at hava skótavirksemi á (2006-2958)* – journal nr. 15/03281.
*Føroya Ríðingarfelag: Umsókn um trøðna matr. nr. 1156, Tórshavn* – journal nr. 18/01264.
*Ólóglig bygging hjá KFUM skótunum á matr. nr. 1160a, Havnardalur, Tórshavn* – journal nr. 19/00789.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Eftir broyting.* – journal nr. 19/01598-2.
*Nýtsla av økinumVerandi byggisamtykt* – journal nr. 19/01598-2.
*Áðrenn broyting* – journal nr. 19/01598-2.
*Skitsa yvir økið* – journal nr. 19/01598-2.
*Málslýsing* – journal nr. 15/03281-26.
*Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 27.03.2019 kl. 13:00* – journal nr. 19/00789-9.
*Samtykt Býráðsfundur, 13.12.2018 kl. 18:00* – journal nr. 18/01264-11.
*Uppskot til ummatrikulering* – journal nr. 18/01264-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta økið, sum víst er á kortskjali *Eftir broyting*, frá D1 øki og 4. Grundumráði til D2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 117/19 West Trading : Umsókn um keyp av øki, at leggja afturat matr. nr. 43g við Argjaboðagøtu, Argir ísv íbúðabygging.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 78/19 | 19/01475-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 139/19 | 19/01475-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 117/19 | 19/01475-2 |

**Upprunin til málið:**
Privat ætlan um at byggja íbúðir á matr. nr 43g á Argjum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við ætlan hjá umsøkjara um at byggja íbúðir á matr. nr. 43g á Argjum, hevur byggi- og býarskipanarnevndin tikið undir við at íbúðir verða bygdar á økinum. Serstøk byggisamtykt er gjørd og samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini, treytað at lendið verður keypt og lagt afturat matr. nr. 43g.
Matr. nr 43g er 3460 $m^2$ til víddar, og skal skal umsøkjari keypa 78 $m^2$ av litra a á Argjum.
Víst verður til skjal nr. 19/01475-3 keyp av ogn til samanlegging við 43g

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
18/00909 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. Nr. 43g, Argir
18/03069 Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr nr 43g Argir

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
19/01475-3 keyp av ogn til samanlegging við 43g

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsøkjarin fær loyvi at keypa 78 $m^2$ av litra a á Argjum at leggja afturat matr. nr. 43g, so treytirnar fyri útstykkingini kunnu gangast á møti og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**

Sambært tinglýsingini keypti umsøkjarin ognina matr.nr. 43g, Kirkjubøur/Argir frá EikBanka fyri kr. 1,8 mill. kr. Víddin á ognini er 3.460m2. Fermeturprísurin er kr. 521. Søluskeytið er tinglýst 26.02.2018.

Vísandi til omanfyri nevnda, og vísandi til, at talan er um sølu av einum øki, ið er minni enn 300m2 til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á, verður mett at marknaðarvirðið á hesum uml. 78 fermetrunum, er kr. 521 fermeturin, sum er sami fermeturprísur sum umsøkjarin hevur keypt grundstykki matr.nr. 43g, Kirkjubøur/Argir fyri í fríðari sølu.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja umsøkjaranum lendi uml. 78 m2, at leggja afturat teirra verandi ogn, matr.nr. 43g, Kirkjubøur/Argir, fyri kr. 521 fermeturin.

Keyparin skal rinda allar útreiðslur til avgreiðslu av málinum, herundir møguligan skeytiskostnað og útreiðslur til matrikulering.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 118/19 Brúgv oman fyri Sandagerði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 79/19 | 19/01667-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 140/19 | 19/01667-3 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 118/19 | 19/01667-3 |

**Upprunin til málið:**
Ynski hevur í longri tíð verið um at gøta verður gjørd um Sandá í Sandagerði fyri at nøktandi gonguleið verður frá Argjum yvirum ánna og soleiðis at tað verður lætt atkomuligt Havnamegin frá yvir til eitt nú Sjósavnið. Henda brúgv kemur somuleiðis at knýta seg í gøtuskipanina kring Havnina, sum arbeitt verður við.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum framhald í útbyggingini av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu, er uppskot gjørt til at byggja brúgv um Sandá í Sandagerði, og gera samband við verandi gøtuskipan. Víst verður til skjal nr. 19-01667-2 Brúgv um Sandá

Ætlaða brúgvin og gøtusambandið liggur innanfyri forn- og náttúrufriðaða økið í Sandagerði, og skal ætlanin sostatt góðkennast av friðingarmyndugleikunum.

Uppskotið er, at brúgvin verður gjørd í sama sniði, sum aðrar brýr í grønu økjunum í býnum. Útvalda sniðið er einkult og byggitøkniliga er sniðið tillagað økið, soleiðis at ikki verður neyðugt at hava stuðlandi súlur niður í ánna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er innanfyri friðingarlinjuna við Sandá, og nærri enn 100 m frá sjóvarmálanum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vegleiðandi tilboð eru fingin til vega frá tveimum veitarum, sum hava gjørt aðrar brúgvar í kommununi. Hesir eru Jan Kann og Ólavur Reinert.
Ólavur Reinert bjóðar 286.600,- við fyrivarni fyri prísi av stáldragarum.
Jan Kann bjóðar 337.000,- uttan stáldragara og rekkverk.
Viðmerkjast skal, at kostnaðurin er sera óvissur, tí eitt veruligt prosjekt fyriliggur ikki. Sum skjal 19-01667-2 vísir, er ætlanin, at brúgvin spennir tvørturum ánna, uttan stuðul ávegis.
Statisk berokning má gerast at tryggja rætta dimensión á berandi dragarum. Kostnaðarmeting er gjørd við støði í lægra tilboðnum. Mett verður at samlaði kostnaðurin verður uml. 550.000 kr.
Grundgevingin fyri at kostnaðarmetingin er væl omanfyri tilboðið er, at sum omanfyri nevnt eru nógvar óvissur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin:**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskot til brúgv um Sandá er sent til hoyringar hjá Yvirfriðingarnevndini, Búnaðarstovuni og Fornminnissavninum.

**Skjøl**
Víst verður til skjal nr. 19-01667-2 Brúgv um Sandá.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til taka av bíligara tilboðnum frá Ólavi Reinert, at seta arbeiðið í verk, treytað av at loyvi verður givið frá avvarðandi myndugleikum, at játta kr. 550.000 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til ráðgeving í sambandi við at avgera støddir á berandi skipanina og íverksetan av brúnni, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>23. mai 2019 | Blað nr.: 479<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 119/19 Kanningar í sambandi við møguligan parkeringstunnil í Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.05.2019 | 27/19 | 19/01708-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 89/19 | 19/01708-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 133/19 | 19/01708-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 119/19 | 19/01708-1 |

**Upprunin til málið:**
Borgarstjórin hevur heitt á teknisku fyrisiting, um at gera tekniskar og fíggjarligar kanningar av møguligum parkeringstunli undir miðbýnum í Havn, sum í skitsuuppskoti verður mettur at verða umleið 1 km langur og hava pláss fyri umleið 700 parkeringsbásum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Stórur tørvur er á parkeringsplássum í Havn, og fleiri loysnir hava verið umrøddar. Trupult er at fáa nøktandi parkeringsøki í miðbýnum, tí tætt er bygt, og infrakervið hevur trupult at bera tað nógv øktu ferðsluna.

Týdningarmikið er, at kanningarnar av einum møguligum parkeringstunli verða samskipaðar við aðrar leiðingar, sum væntandi skulu farast undir komandi árini. Viðmerkjast skal, at eitt projektarbeiði longu er gjørt í sambandi við gerð av tunli undir jørð til dagføring av leiðingunum til býin.

Ein góð loysn hevði verið at sett ein innanhýsis arbeiðsbólkur til at gera eina yvirskipaða tørvslýsing av møguligum parkeringstunli, leiðingum o.a. og at fáa ein ráðgeva til at gera eitt skitsuprojekt, kostnaðarmeting v.m.

Mett verður, at arbeiðið at gera tørvslýsing, skitsuprojekt, kostnaðarmeting o.a. verður mett til kr. 500.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mai 2019 | Blað nr.: 480 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til
- at seta ein innanhýsis arbeiðsbólk til at gera eina yvirskipaða tørvslýsing,
- at fáa ein ráðgeva til at gera eitt skitsuprojekt og kostnaðarmeting,
- at játta kr. 500.000 av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið, til arbeiðið, og

at beina málið í byggi- og býarskipanarnevdina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og byggi- og byarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 120/19 Fjarhiti til Býlingshúsið vesturi á Flat, matr. nr. 1xæ, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 20/19 | 19/01619-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 134/19 | 19/01619-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 120/19 | 19/01619-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Tí er ætlanin at knýta Býlingshúsið vesturi á Flat í fjarhitan, tá útbyggingin við at víðka stovnin verður sett í verk.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 425.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Lendisarbeiði tá Býlingshúsið vesturi á Flat verður útbygt í 2019.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Býlingshúsið vesturi á Flat fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | X | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin í løtuni. Tað merkir, at barnagarðurin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 425.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Turið Horn luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Nátturu- og umhvørisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 121/19 Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 21/19 | 19/01620-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 135/19 | 19/01620-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 121/19 | 19/01620-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Ætlanin er at knýta Dagstovnin við Landavegin í fjarhitan, tí Fjarhitafelagið fer ígongd við at leggja leggja fjarhitaleiðingar á Landavegnum.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 425.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Barnagarðurin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin í løtuni. Tað merkir, at barnagarðurin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
- at játta 425.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Nátturu- og umhvørisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 122/19 Fjarhiti til Badmintonhøllina, matr. nr. 1268a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 22/19 | 19/01621-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 136/19 | 19/01621-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 122/19 | 19/01621-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Ætlanin er at knýta Badmintonhøllina í fjarhitan, fjarhitin liggur í Gundadalsvegnum framvið Badmintonhøllini.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 475.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Frítíðarskúlin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin. Tað merkir, at frítíðarskúlin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum. Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
- at játta 475.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 15. mai 2019: Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 123/19 Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 23/19 | 19/01622-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 137/19 | 19/01622-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 123/19 | 19/01622-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Tað er sera umráðandi at fylgja við allari tøkniligari framgongd og kunna verða við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Hettar er fyrsti bygningur hjá kommununi, sum fer at hava sólsellur á takinum, ið framleiða "Grønan" streym. Henda royndarætlan verður roynd á Dagstovninum á Velbastað, sum m.a. miðvíst er farin at arbeiða fram ímóti at verða ein grønur stovnur.
Streymurin, sum verður framleiddur, verður seldur til SEV.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 575.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingi

**Umhvørvisárin**
Dagstovnurin fer at framleiða grøna el orku, og hetta minkar $CO_2$ útlátið á elnýtsluni við uml. 90%.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**
Skjøl við kostnaðarmeting, framleiðsla av streymi og plasering av sólsellum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar | Fyri ávís økir í | Fyri ávísar samfelagsbólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | kommunu | kommununi | ella felagsskapir | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar kommuna ger avtalu við SEV um at selja streymin til SEV. Tað merkir, at Tórshavnar kommuna fær eina inntøku fyri sølu av streymi, sum húsaumsitingin fær ágóðan av.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 575.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 15. mai 2019: Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 124/19 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1378, Tórshavn til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2019 | 70/19 | 19/01483-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.05.2019 | 92/19 | 19/01483-3 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 124/19 | 19/01483-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umhvørvisstovan biður um ummæli til at sundurbýta eina útstykking á matr. 1378 millum Oyggjarvegin og Vestara Ringveg.

Umsóknin til Umhvørvisstovuna er um at sundurbýta 6 grundøkir í 3 stykkir á 500 fermetrar og 3 stykkir á 467 fermetrar.

Ongin fullfíggja útstykkingarætlan fyriliggur.

Umsøkjarin vísir á, at ein vegatkoma kann verða frá Skótarók yvir gjøgnum tvær traðir og útkoyring til byrjan av Oyggjarvegnum.

Víst verður til, at endaliga staðsetingin av innkomuvegnum ikki er ásett. Landsverk og Tórshavnar kommuna arbeiða fyri at finna eina endaliga loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði**
1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri mál**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Onki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni j. nr. 19/01483-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla frá at viðmæla at sundurbýta matr. 1378, vísandi til at umsóknin ikki lýkur ásetingunum fyri økið og at staðsetingin til innkomuvegin ikki er ásettur og ongin útstykkingar ætlan fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2019:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson, býráðslimur biður um at fáa málið á skrá til fyrstkomandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 23. mai 2019: Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og seks ímóti.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

Tróndur Sigurðsson ynskir serstøðu viðmerkta í gerðabókina, ið er soljóðandi: Heitt verður á býráðið um at loyva sundurbýti, og at býráðið heitir á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna, sum er gjørd og endaliga staðfesta, at eingin vegur skal koma ígjøgnum Krákugjógv og ei heldur á niðasta partin á oyggjarvegnum.

## 125/19 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 201/14 | 14/04756-36 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 14/04756-36 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 221/17 | 14/04756-36 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 233/17 | 14/04756-36 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 231/17 | 14/04756-36 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 260/17 | 14/04756-36 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 262/17 | 14/04756-36 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 32/19 | 14/04756-36 |
| 9 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 29/19 | 14/04756-36 |
| 10 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 10/19 | 14/04756-36 |
| 11 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 64/19 | 14/04756-36 |
| 12 Mentamálanevndin | 24.04.2019 | 139/19 | 14/04756-36 |
| 13 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 104/19 | 14/04756-36 |
| 14 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 116/19 | 14/04756-36 |
| 15 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 89/19 | 14/04756-36 |
| 16 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 125/19 | 14/04756-36 |

**Málslýsing:**
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin

samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstraræltlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini ynskja hetta málið á skrá.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 09. September 2013:** Kunnað varð um málið.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðst í juni 2013 sendi Tórshavnar kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 fermetra stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll, hetta samsvarandi heimild í lógini um landsjørð § 7a.

Liðin eru skjótt fýra ár, har samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fiskimálaráðið øðrumegin og festararnar hinumegin. Upprunaavtalan var, at landið skuldi bera endurgjaldskostnaðin, meðan kommunan bar útreiðslurnar at byggja vøllin.
Enn hevur ikki borið til at finna semju um endurgjaldið til tann festaran, sum skal flyta virksemið av økinum og longur suður. Eftir áheitan tilnevndi sorinskrivarin uttanveltaðan metingarmann, men semja fekst heldur ikki um sýns- og metingarskránna, ið er sjálv grundarlagið fyri metingini hjá metingarmanninum.

Ongar veruligar samráðingar hava verið síðani í fjør vár. Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutanum er skrivað, at saman við Tórshavnar Golffelag verður farið undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi. Í hesum sambandi verður málið nú tikið uppaftur.

Sum framgongur av málinum omanfyri, fyriliggur eitt verkætlanaruppskot um golfvøll við 18 holum, umframt driving range, ið er staðsett í fyrra grótbrotinum. Uppskotið stóð Edwin Roald, viðurkendur íslendskur golfvallararkitektur, fyri í samstarvi við kommununa og Golffelagið. Sí hjáløgdu verkætlanarlýsing.

Vøllurin skuldi tá byggjast í einum yvir eitt stutt áramál, tí hann skuldi verða liðugur til Oyggjaleikir 2019. Hetta er ikki longur aktuelt, og tí ber til sum liður í heildarætlan at skipa tilgongdina at byggja golfvøllin øðrvísi og yvir longri tíð.

Hetta er tilgongd, ið Golffelagið sjálvt vísir á sum gongda leið eitt nú soleiðis, at 1-2 hol (breytir) verða bygd hvørt árið, og har ávís upphædd samsvarandi verður sett á íløguætlanina.

Til tess at koma víðari, verður mett neyðugt, at samráðingarnar um leigu av lendinum og endurgjald tí viðvíkjandi verða tiknar uppaftur soleiðis, at málið verður loyst skjótast. Harumframt at heita á golfvallararkitektin um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við umboðum fyri kommununa og golffelagið.

Eingin játtan er tøk til golfvøll á íløguætlanini, men mett verður, at hetta fyrsta fyrireikandi tíðarskeiðið kann haldast innan verandi rakstrarkarmar, og at íløgujáttan verður at koma á fíggjarætlanini frá 2018.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka uppaftur samráðingarnar um leigu av lendinum til golfvøll. Harumframt verður mælt til at heita á golfvallararkitektin, sum í 2013 gjørdi uppskotið til golfvøll, um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við fimm umboðum, har fyrisitingingarnar hava hvør sítt og Tórshavnar Golffelagið hevur tvey.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til heildarætlan og yvirskipaða verkætlartilgongd verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotið til tillagað verkætlan um bygging av golfvølli, ið løgd varð fram í mentamálanevndini 13. september 2017.

Golfvøllur við 9 holum fyrst
Sbrt. uppskotinum verður hildið fast við heildarætlan um golfvøll við 18 breytum/holum á Glyvursnesi, men har mælt verður til bygging í stigum, har fyrsta stigið er at byggja níggju hol árini 2018-2022, og at tað eftir hetta verður tikin støða til, hvørt farast skal víðari at byggja vøllin út til 18 hol beinanvegin ella seinni.

Fyri at skipa byggiarbeiðið best er tilmælið, at trý hol verða bygd um árið uttan íhald soleiðis, at tað í 2022 eru 9 hol tøk. Hetta hevur eisini tann ítróttaliga fyrimun, at til ber at spæla golf samstundis, har tey fyrstu trý holini væntandi eru klár í 2020, seks hol í 2021 og níggju hol í 2022.

Verkætlanarbólkurin, sum eru fyrisitingarstjórarnir og tvey umboð fyri golffelagið, tekur undir við hesi tilgongd. Henda bygging kann í stórum øll fremjast í tí syðra økinum av Glyvursnesi, sum sambært byggisamtyktini longu er lagt út sum D2 økið, tvs. ítróttarøki. Hetta økið er uml. 270.000 m2.

Kommunan sendi í 2013 samsvarandi áseting í grein 7a í lóg um landsjørð umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 m2 stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll við 18 holum. Við broyttu tilgongdini, har byrjað verður at byggja 9 hol, ber til at tillaga umsóknina um leigu soleiðis, at økið bert fevnir um teir uml. 270.000 m2.

Integrera golfvøll við tyrving og havnarútbygging
Sum liður í heildarætlanini fyri golfvølli við 18 holum, verða í frágreiðingini eisini umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina bæði við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum, har mett verður, at til ber at skapa felags ágóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri golfvøllin ítøkiliga vil tað eitt nú merkja, at til ber at byggja suðureftir, har lendið er ikki so avbjóðandi sum á norðara partinum, og inn í umskapaðu grótbrotini og harvið spara lendi. Í frágreiðingini verður víst á dømi úti í heimi tí viðvíkjandi, og mælt verður til, at ymsu kommunalu áhugapartarnir og polilitiska skipanin viðgera perspektivini í hesum.

Verkætlanarbólkurin tekur sum heild undir við hesi tilgongd, men ásannandi, at talan er um viðurskifti, sum kunnu taka langa tíð, verður mælt til, at politiska skipanin setir út í kortið heildarætlan fyri Glyvursnes, harundir, hvat gerast skal við grótbrotini og møguliga integratión við golfvøllin.

Smart Range
Eisini sum liður í at spara lendi í fyrsta byggistigi, verður í frágreiðingini skotið upp at fáa til vega sonevnt Smart Range, sum er innandura golfsimulator. Smart Range er tilgild loysn, sum í ávísan mun kann koma í staðin fyri ella supplera ein vanligan driving range, sum er stórur og lendiskrevjandi venjingarvøllur.

Fyrimunur við Smart Range er harumframt, at tað nýskapandi háttur at introdusera golfspælið bæði til børn, vaksin og eldri, at skapa forvitni og draga nýggjar íðkaðar til føroyska golfumhvørvið. Ein Smart Range kann setast upp í hølum so at siga hvar sum helst.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við at fáa til vega Smart Range í øllum førum sum partur av fyrsta byggistigið.

Tíðarætlan og kostnaðarætlan

Uppskotið er, at verkætlanin í 2018 verður nærri prosjekterað og designað, at byrjað verður at byggja trý tey fyrstu holini, og at Smart Range verður sett upp í býnum. Í 2019 verða hesi holini gjørd liðug og byrjað verður uppá trý tey næstu. Og so heldur arbeiðið fram soleiðis, at øll tey níggju holini eru liðug og klára at spæla á í 2022.

Samlaði kostnaðurin er mettur til uml. kr. 27 mió, har metti tørvurin fyri 2018 er kr. 4 mió. Harumframt skulu gerast gøtur og amboðsbygningur.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við tíðarætlanaruppskotinum, sum tó má taka støði í teirri fígging, ið játtað verður til golfvøllin hesi árini. Í løtuni er eingin fígging sett av til endamálið burtursæð frá teimum kr. 300.000, ið settar eru av til fyrireikingar í inniverandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at:

- uppruna golfvallarætlanin verður tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum, men tó so, at tað skal bera til at byggja vøllin út til 18 hol seinni
- senda Búnaðarstovuni nýggja umsókn um leigu av lendi svarandi til syðra D2-økið á Glyvursnesi, í alt uml. 270.000 m2, ætlað til golfvøll við 9 holum
- fáa til vega nærri politiska støðutakan til møguleikan at integrera næsta byggistig til 18 hol við grótbrotini og samskipast við aðrar kommunalar verkætlanir har til tess at skapa felags ágóðar sum liður í heildarætlan fyri Glyvursnes
- fyrireika útvegan av Smart Range, og at
- ætlan fyri fígging verður løgd í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur seinni.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.
**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Útsett

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Við støði í løgtingslóg um landsjørð § 7a hevur kommunan tvær ferðir søkt Búnaðarstovuna um at leiga lendi á Glyvursnesi til golfvøll. Nevnda lógargrein ásetir, at Búnaðarstovuni verður heimilað at taka aftur nýtslurætt frá festara til lendið, tilhoyrandi festi, og leiga kommunu lendið til almannagagnligt endamál. Verður nýtslurættur til lendið tikin aftur, skal kommunan rinda fult endurgjald.

Fyrru ferð var í juni 2013, tá býráðið tók undir við verkætlanaruppskoti um golfvøll við 18 holum við samlaðum lendistørvi uppá uml. 630.000 m2, har nógv tann størsti parturin er í Glyvurshaga (festari Sjúrður Patursson), ein nógv minni partur í Kirkjubøhaga fyri handan (festari Poul Müller), umframt táverandi grótbrot.

Frammanundan høvdu landsstýrið og kommunan avtalu um, at landið skuldi bera part av endurgjaldinum til festaran. Í tí sambandi játtaði løgtingið kr. 4 mió í fíggjarlógini 2015 til endamálið. Samráðingarnar um endurgjald bóru ikki á mál, og játtanin í fíggjarlógini er síðani dottin burtur.

Í 2017 varð lagt fyri býráðið tillagað verkætlanaruppskot um golfvøll við í fyrsta umfari 9 holum, sum allur kundi gerast innanfyri verandi byggisamtykt í Glyvurshaga. Við støði í hesum varð søkt av nýggjum um lendi stórt uml. 270.000 fermetrar í Glyvurshaga.

Samráðingar vórðu tiknar upp aftur í 2018. Avtalað varð í hesum sambandi at taka støði í lendistørvi, ið svarar til ein golfvøll við 18 holum, tí hetta kortini verður endamálið.

Tó er í hesum umfari valt at avgreiða viðurskiftini við Glyvurshaga fyrst, sum eisini er nógv mest umfevnandi bæði viðvíkjandi avleiðingum fyri virki festarans og sjálvari endurgjaldsupphæddini. Tá golfvallarverkætlanin komandi árini er neyvari ment og projekterað, kann nýggj meting gerast um tørvin at leiga ávíst lendi í Kirkjubøhaga fyri handan eisini.

Vísandi til broyttu umstøðurnar á Glyvursnesi, har kommunan keypti lendið til nýtt grótbrot í sambandi við havnarútbyggingina, vil Búnaðarstovan hava kommununa at keypa gamla grótbrotið úr festinum. Hetta er somuleiðis tikið við í sáttmálauppskotið.

Sáttmálapartarnir eru Búnaðarstovan, festarin Sjúrður Patursson og Tórshavnar kommuna.

**Sáttmálauppskotið um lendi til golfvøll**
Gjørt er kort yvir Glyvursnes, sum lýsir stødd á lendi, longdir á nýggjari girðing, uppdyrkingarvegi o.a., sum ymisk endurgjøld taka støði í, sí fylgiskjal 1 í sáttmálunum. Eisini framgongur staðseting av nýggjum seyðahúsi, nýggjum dyrkaðum lendi v.m.
Við hesum sáttmálanum leigar kommunan í alt 522.000 m2 í 30 ár. Leigumálið kann leingjast. Festarin missir við hesum nýtslurættin til hetta lendið, og tí er neyðugt hjá festaranum at flyta alt virksemið av økinum. Í hesum sambandi skal endurgjaldast fyri at velta upp úr nýggjum uml. 46.000 m2, gera nýggjan uppdyrkingarveg 578 m og nýggjar girðingar í alt uml. 4.000 m. Eisini skal endurgjaldast fyri mist bit. Endurgjøld fyri øll hesi viðurskifti er uml. kr. 3,1 mió.

Gjørt verður harumframt gerðabýti fyri fastar ognir. Kommunan yvirtekur verandi seyðahús og maskinhøll hjá festaranum. Festarin byggir nýtt seyðahús við maskinhøll 13,6 x 34 m, ið er kostnaðarmett til uml. kr. 6 mió., ið kommunan skal endurgjalda.

Haraftrat keypir kommunan gamla grótbrotið, sum er uml. 66.000 m². Tá dagsvirðið av áður inngoldnum gjøldum fyri tøku av gróti í gamla grótbrotinum tíðarskeiðið 1986-2016 er drigin frá, verður keypskostnaðurin uml. kr. 612.000.

Samlaða virði av sáttmálanum er kr. 9.843.016, ið skulu falla til gjaldingar í fjórðingum árini 2019-2022, tað er uml. kr. 2,46 mió um árið.

Leigusáttmálin fyri lendið kostar í løtuni kr. 5.000 um árið. Hóast sáttmálin verður settur í verk í ár, hevur festarin nýtslurætt av bygningum og lendi til í seinasta lagi 31.

desember 2022, tá øll arbeiði festarans sambært sáttmálanum skulu vera avgreidd. Kommunan skal seta upp girðing kring golfvøllin uml. 1.350 m. Henda útreiðsla, sum mett er til uml. kr. 200.000, er ikki partur av sáttmálanum.

Sáttmálin er endaliga treytaður av øðrum myndugleikaloyvum og krøvum, harundir friðingar- og byggimyndugleikum.

Sum lýst omanfyri varð avtalað gjørd við landsstýrið um fígging av endurgjaldinum. Nú sáttmáli eftir ætlan verður gjørdur um hesi viðurskifti, eigur kommunan at taka málið um fígging av endurgjaldinum uppaftur við landsstýrið til tess at staðfesta, um landsstýrið stendur við hesa avtalu. Hetta hevur aftur týdning fyri, hvør endaliga endurgjaldsupphæddin hjá kommununi verður at fíggja. Verður upphæddin tann sama, sum løgtingið játtaði í 2015, er fíggjartørvurin hjá kommununi til endurgjaldið kr. 5,85 mió, ella uml. kr. 1,46 mió um árið. Hetta verður tó ikki staðfest enn.

**Víðari verkætlanartilgongd**
Tá sáttmálin er góðkendur endaliga av øllum pørtum, ber til hjá kommununi at arbeiða meira ítøkiligt við golfvallarverkætlanini. Fram til og við 2022 verður ítøkiligt lendisarbeiði tó at samskipa við virksemi festarans á økinum.

Næsta stig er at gera ráðgevarasáttmála við golfvallararkitektin, har fyrstu arbeiðini verða prosjektering av lidnum golfvallarsniði samsvarandi ætlaðum byggistigum, harundir kostnaðarætlan býtt yvir ár. Seinni skal støða takast til, hvussu farast skal fram viðvíkjandi útbjóðing av lendisarbeiði v.m.

Í hesum sambandi skulu eisini neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikum og byggimyndugleikanum fáast til vega. Býráðið hevur samtykt at broyta byggisamtyktina fyri Glyvursnes ætlað golfvølli, har ávíst øki á Glyvursnesi verður broytt til D2 øki (mál 19/00427). Málið er í løtuni til almenna hoyring.

Higartil hava tvey umboð fyri Tórshavnar Golffelag tikið lut í arbeiðsbólki saman við kommununi. Uppgávan hevur í høvuðsheitum verið samskipan og at fáa til vega tey bæði verkætlanaruppskotini, ið gjørd eru. Mett verður skilagott, at umboð fyri golffelagið halda fram í víðari menningini av golfvallarverkætlanini. Sjálv verkætlanin verður leidd av verkætlanardeildini.

**Fígging**
Á løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur eru kr. 147.000 tøkar. Í málið 19/00144 er

raðfest játtan til golfvøll o.a. kr. 1.050.000 á L57016 Smærri ítróttaranlegg. Írestandi fíggjartørvur til tess at rinda endurgjaldið í inniverandi ári er kr. 1.264.000. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað við at flyta kr. 1 mió. av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión, og kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg.

Í langtíðar íløguætlanini er lagt upp til fígging til golfvøll. Umframt fígging til endurgjaldið, eigur hædd eisini at takast fyri fígging til at prosjektera og byggja sjálvan golfvøllin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja sáttmálan um lendi til golfvøll á Glyvursnesi og í hesum sambandi at játta kr. 2.460.754 hvørt árið 2019, 2020, 2021 og 2022 á kontu 5775 ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur til tess at fíggja endurgjaldið sambært sáttmálanum.

Mælt verður eisini til, at gjaldið fyri 2019 verður fíggjað soleiðis:

- kr. 147.000 á løgukontu L57016 Golfvøllur
- kr. 1.050.000 av raðfestari játtan til golfvøll o.a. á løgukontu L57029 Smærri ítróttaranlegg
- kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg
- kr. 1.000.000 av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at heita á landsstýrið um fígging til endurgjald samsvarandi avtaluni við kommununa tí viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til tvær viðgerðir í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019**: Einmælt samtykt**.**
Marin Katrin Frýdal fór av fundinum vegna ógegni og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 126/19 Skipan av fyribils dagstovni í Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.04.2019 | 138/19 | 19/01676-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 118/19 | 19/01676-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 91/19 | 19/01676-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 126/19 | 19/01676-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur á fleiri dagstovnaplássum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur fingið allar neyðugar góðkenningar at skipa fyribils dagstovn í lonini í Hoydølum til árslok 2020 (mál 19/00224).

Í løtuni eru tríggjar vøggustovur í hølunum, sum eru tengdar at ávikavist Býlingshúsinum inni á Gøtu og Býlingshúsinum í Maritugøtu. Hesir stovnar verður í løtuni útbygdir, og so skjótt hesar útbyggingar eru lidnar, flyta børnini og starvsfólkini í teirra viðkomandi stovn væntandi í summarfrítíðini í seinasta lagi.

Skotið verður upp at skipa fyribils dagstovn í Hoydølum við egnum rakstrarstaði í fíggjarætlanini frá 1. august 2019 til 31. desember 2020 – ætlandi á kontu 3110, sum áður varð nýtt til Reiðrið, ið eisini var fyribils dagstovnur.

Ynskiligt er at fáa bjóðað pláss út í BARN skjótast eisini soleiðis, at til ber at lýsa eftir starvsfólki og manna stovnin.

Tey, sum fáa pláss í fyribils stovninum í Hoydølum, verða ikki knýtt til ávísan stovn, so sum skipanin hevur verið við omanfyri nevndu býlingshúsum. Heldur skulu foreldrini, sum fáa pláss í fyribils stovninum í Hoydølum, bókað sær nýtt stovnspláss at byrja í seinasta lagi 1. januar 2021.

Mett verður í fyrsta umfari skilagott at bjóða 36 vøggustovupláss (3 stovur) og 20 barnagarðspláss (1 stova) út BARN at byrja 1. august, tvs. 56 pláss. Til ber seinni at bjóða fleiri pláss út eftir tørvi og so hvørt starvsfólk og fígging er til tað.

Sum upplýst í øðrum máli (19/00945) er játtan ikki tøk í fíggjarætlanini til nýggju plássini, sum her verða útvegað. Kostnaður sambært fíggjarleistinum fyri hesi ávikavist 36 vøggustovuplássini og 20 barnagarðsplássini í 6 mánaðir er kr. 2.094.549. Neyðugt er við eykajáttan til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/00224 Leigumál – Lonin í Hoydølum til fyribils dagstovn

19/00945 Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **X** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, fyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at skipa fyribils dagstovn í lonini í Hoydølum til í fyrsta umfari 36 vøggustovuplássum og 20 barnagarðsplássum frá 1. august 2019, og í hesum sambandi um at játta kr. 2,1 mió til kontu 3110 Lonin í Hoydølum av framfluttum avlopi konto 20910 Aðrar inntøkur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til tvær viðgerðir í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

## 127/19 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |
| 25 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 127/19 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi.

Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst

samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð

dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Imóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jógvan Arge, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Halla Samulsen

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mai 2019 | Blað nr.: 510<br>Formansins merki: |

## 128/19 Framflytingar fyri árið 2018

| Viðgjørt av | | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | | 24.04.2019 | 120/19 | 19/01527-1 |
| 2 Býráðsfundur | | 24.04.2019 | 98/19 | 19/01527-1 |
| 3 Býráðsfundur | | 23.05.2019 | 128/19 | 19/01527-1 |

**Upprunin til málið:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar Kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í Býráðnum sum eykajáttan.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við, at roknskapurin fyri 2018 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2019.

Samlaða framflytingin, íroknað Tórshavnar Havn, fyri rakstur er 23,7 mió.kr netto og fyri íløgur 223,2 mió.kr.

Stjórnin mælir til fylgjandi broytingar í framflytingum:

| | **Fíggjast av:** | | | **Flyast á:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§2** | | | | | |
| 2720 | Heilsuhúsið | **481** | 2721 | Røktartænastur | **4.218** |
| 2722 | Tilboð | **4.904** | 2730 | Fyrisiting | **44** |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | **807** | 2755 | Flytingar millum samstørv | **2.990** |
| 2750 | Ansingarsamsýning | **1.017** | | | |
| 2761 | Leiga | **43** | | | |
| **§3** | | | | | |
| 3142 | Frítíðarskúlin á Argjahamir | **153** | 3317 | Ungdómshús á Argjum | **153** |
| **§4** | | | | | |
| 4125 | Frískúlin í Lítlaskúla | **101** | 4126 | Forskúlin til Lítlsakúla | **101** |
| **§6** | | | | | |
| 6211 | Aðrar útreiðslur fríðkan | **389** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **389** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **129** | 6611 | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | **129** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **713** | 6710 | Vatnveiting | **713** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **383** | 8210 | Gøtuljós | **383** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **307** | 7610 | Parkeringsskipan | **307** |
| 8112 | Asfalt | **682** | 8113 | Ferðsla | **682** |
| 8112 | Asfalt | **312** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **312** |
| **§7** | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 7110 | Renovatión | **755** | 1313 | Tekniska fyrisiting | **755** |
| 7110 | Renovatión | **3.500** | 8375 | Rakstrargøgn | **3.500** |
| 7510 | Bussleiðin | **307** | 7610 | Parkeringsskipan | **307** |
| 7510 | Bussleiðin | **154** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **154** |
| 8112 | Bussleiðin | **385** | 6110 | Umsiting og røkt bygningar | **385** |
| 8112 | Bussleiðin | **172** | 6510 | Kirkjugarðar | **172** |
| 8112 | Asfalt | **312** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **312** |
| | **Tilsamans** | **16.006** | | **Tilsamans** | **16.006** |

Fyri Tórshavnar Havn mælir Havnameistarin til at flyta fram minus 761 tkr netto til rakstur og 84,8 mió. kr til íløgur.

Inntøkurnar hjá Tórshavnar Havn fyri 2018 eru umleið 10 mió.kr hægri enn mett.

Havnameistarin mælir tí eisini til fylgjandi flytingar av meirinntøku:

| | **Fíggjast av:** | | | **Flyast á:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§7 7410** | **Tórshavnar havn** | | **§7 7410** | **Tórshavnar havn** | |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | **4.500** | 14 | Keyp av vørum og tænastum | **1.500** |
| | | | 16 | Leiga og viðlíkahald | **3.000** |
| | **Tilsamans** | **4.500** | | **Tilsamans** | **4.500** |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læattar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta samlaða framflyting fyri rakstur 23,7 mió.kr netto og fyri íløgur 223,2 mió.kr. umframt verður mælt til at samtykkja omanfyri nevndu broytingar og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Rætting av talvu í málslýsingini:

Havnameistarin mælir til niðanfyristandandi flytingar av meirinntøku. Tann niðasta linjan var dottin út í talvuni omanfyri.

| | |
|---|---|
| Fíggjast av | Flytast á |
| § 20 7410<br>21 Søla av vørum og tænastum 4.5 mió | § 7 7410<br>14 Keyp av vørum og tænastum 1.5 mió<br>16 Leiga, viðlíkahald og skattur 3.0 mió |
| 21 Søla av vørum og tænastum 1.0 mió | Sjóvinnuhúsið 1.0 mió |

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

# 129/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 145/19 | 19/00096-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 129/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Framlagt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Bjørg Dam |
| | Jógvan Arge | |